# Beinleiðis brot stýrisskipanina

**– Løgmaður hevur enn einaferð beinleiðis brotið stýrisskipanarlógina. Tað stendur greitt í stýrisskipanarlógini, at týdningarmikil uttanríkispolitisk mál skulu umrøðast í uttanlandsnevndini. Tá hann sjálvur hevur kallað fráboðanina til ST sum stórtíðindi, skuldi hann sjálvssagt ráðført seg okkum áðrenn stjórnin sendi brævið til ST, heldur limurin í uttanlandsnevndini, Hergeir Nielsen**



*–Henda grundgeving hongur snøgt sagt ikki saman hjá løgmanni. Vit høvdu onga uttanríkislóg í februar 2004, so hatta heldur ikki. Sum fleiri aðrir tingmenn hvakk eg við, tá eg hoyrdi løgmann koma við ST-fráboðanin gamlaárskvøld, tí vit hava ongantíð fingið upplýst, at málið fór at vera fráboðað til ST, sigur Hergeir Nielsen*

*Savnsmynd*

ST-FRÁBOÐAN
*Páll Holm Johannesen*
*pallurin@hotmail.com*

– Tað sigur seg sjálvt, at løgmaðurátti at ráðført seg við okkum í uttanlandsnevndini. Tað stendur týðuligt í Stýrisskipanarnevndini, at landsstýrið skal ráðføra seg við uttanlandsnevndina, tá mál av stórum uttanlandspolitiskum týdningi eru á skránni.

Limurin hjá Tjóðveldisflokkinum í uttanlandsnevndini, Hergeir Nielsen, er samdur við formanninum í uttanlandsnevndini, Johan Dahl, í, at løgmaður átti at ráðført seg við uttanlandsnevndina, áðrenn hann gav donsku stjórnini grønt ljós til at senda uttanríkislógina til ST.

– Løgmaður hevur enn einaferð beinleiðis brotið stýrisskipanarlógina. Tað stendur greitt í stýrisskipanarlógini, at týdningarmikil uttanríkispolitisk mál skulu umrøðast í uttanlandsnevndini. Tá hann sjálvur hevur kallað fráboðanina til ST sum stórtíðindi, skuldi hann sjálvssagt ráðført seg okkum áðrenn stjórnin sendi brævið til ST, heldur Hergeir Nielsen

Tingmaður Tjóðveldisfloksins vísir á, at løgmaður áður hevur brotið Stýrisskipanarlógina í samband við Íslandssáttmálan.

Løgmaður hevur um vikuskiftið ført fram, at ein av orsøkunum at hann ikki valdi at leggja málið um ST-fráboðanina fyri uttanlandsnevndina var, at Løgmansskrivstovan longu í februar 2004 í einum uppriti kunnaði tingnevndina um, at uttanríkislógin fór at vera fráboðað ST.

–Henda grundgeving hongur snøgt sagt ikki saman hjá løgmanni. Vit høvdu onga uttanríkislóg í februar 2004, so hatta heldur ikki. Sum fleiri aðrir tingmenn hvakk eg við, tá eg hoyrdi løgmann koma við ST-fráboðanin gamlaárskvøld, tí vit hava ongantíð fingið upplýst, at málið fór at vera fráboðað til ST, sigur Hergeir Nielsen

### Stormur í vatnglasi

– Danska stjórnin sendir ST fráboðaninir um Føroyar á hvørjum ári, og uttanlandsnevndin hevur ongantíð umrøtt hesar fráboðanir. Eg skilji tí ikki allar atfinningarnar, tí fyri mær tykist tað, sum fer fram í løtuni, at vera ein stormur í einum vatnglasi

Annar av liminum hjá Javnaðarflokkinum í uttanlandsnevndini, John Johannessen, heldur ikki, at tað var so umráðandi at uttanlandsnevndin varð ráðførd, áðrenn danska stjórnin boðaði ST frá um uttanríkislógina.

*Átti løgmaður sambært stýrisskipanini ikki fráboðað uttanlandsnevndini?*

– Eg haldi tað verður lagt alt ov nógv í hasa fráboðanina. Tað er sjálvandi at fegnast um, at Føroyar hava fingið staðfest sín sjálvsavgerðarrætt, men annars ávirkar fráboðanin ikki tað stóra. Tá alt kemur alt skal fullveldi takast í Føroyum. Finna vit ein nóg stóran meirluta fyri hesum her heima, fer eingin donsk stjórn at seta seg ímóti ynskinum hjá føroyingum, heldur John Johannessen.

### Advokatar tala at

Advokatarnir, Bjørn á Heygum og Anfinn V. Hansen, sum vóru við at gera Stýrisskipanarlógina, finnast eisini at framferðini hjá løgmanni í málinum.

–Fyri tveimum árum síðani kundi uttanlandsnevndin hjá løgtinginum av góðum grundum ikki vita, at ríkisstjórnin fór at boða ST frá uttanríkislógini við donsku viðmerkingunum um, at Føroyar hoyra undir donsku grundlógina. Hetta gjørdi hann, hóast løgtingið í summar metti, at tað vóru tær føroysku viðmerkingarnar, sum vóru galdandi, søgdu Bjørn á Heygum og Anfinn V. Hansen við Útvarp Føroya í morgun.

Teir meta eins og Hergeir Nielsen, at grundgevingin hjá løgmanni fyri ikki at leggja málið fyri løgtingið ikki er nóg haldgóð, tí tað er hent so nógv í málinum síðan februar 2004.

### FAKTA

**Stýrisskipanarlógin**

§ 54. Løgtingið velur millum løgtingsmenn eina uttanlandsnevnd við sjey limum, sum landsstýrið ráðførir seg við, áðrenn avgerðir verða tiknar, ið hava stóran uttanlandspolitiskan týdning.

Stk. 2. Somuleiðis skal landsstýrið ráðføra seg við hesa nevnd í sambandi við samráðingar við ríkismyndugleikarnar av stórum týdningi fyri viðurskiftini Føroya og Danmarkar millum.

KAUPTHING
Virðisbrævameklarafelag



Vika 2 2006

# Gott partabrævaár í væntu

MARKNAÐARRÁK

Partabrævamarknaðirnir hava givið góðan vinning seinastu 3 árini. Norrøn partabrøv hava til dømis givið um 20% um árið, og liggja nú á leið á somu kursum sum í 2000. Kursirnir eru ikki hækkaðir av nakrari KT-bløðru hesuferð, men hava bert fylgt við økingini í inntøkum hjá virkjunum, og útlitini fyri 2006 eru eisini hampulig. Í USA eru vísitølini Nasdaq og S&P500 hækkaði ávikavist 4,5% og 3,0% fyrstu vikuna í 2006. Til stuttleika kann nevnast, at í 86% av førunum, har S&P500 er hækkað fyrstu vikuna í árinum, hevur árið sum heild verið gott fyri partabrøv.

### Renturnar ota seg niðureftir

10-ára danska rentan lækkaði 0,05% í farnu viku, og hon er nú 3,23%. Í septembur var hon niðri á 3,00%, so hon kann halda á at lækka nakað aftrat. Tó er núverandi stigið sera lágt, og tað ber tí væl til, at vit fáa eitt lítið rykk uppeftir hesa vikuna.

### ATP tekur ikki av keypsboði í TDC

Danski eftirlønarrisin ATP, ið eigur um 5,5% í TDC hevur kunngjørt, at tey ikki taka av keypboðnum frá Nordic Telephone Company. Tí lækkaðu TDC partabrøvini 6%. Orsøkin er, at ATP metir, at boðskursurin á 382 er ov lágur. Tá boðið frá Nordic Telephone Company bert er galdandi, um tey fáa minst 90% av partabrøvunum, kann støðan hjá ATP føra við sær, at TDC handilin ikki gerst veruleiki. Fyribils kann roknast við, at freistin at taka av tilboðnum verður longd. Í løtuni eru óivað nógvir partaeigarar ið harmast um støðuna hjá ATP, tí ATP kann forða hesum at fáa góðan kursvinning fyri teirra TDC partabrøv.

### Hesa vikuna

Dollarin verður í andgletti hesa vikuna. Amerikanski handilsjavnin fyri novembur verður kunngjørdur, og hesin hevur týdning fyri dollaran, sum er viknaður nakað seinasta mánaðin. Gongdin í TDC-málinum fer væntandi at seta dám á allan danska partabrævamarknaðin.

**Donsk 10-ára renta**




**Vísital fyri norrøn partabrøv**




**Gjaldoyru**

| | Kursur | +/- % |
|---|---|---|
| USD | 613,78 | -2,5% |
| JPY | 5,36 | 0,3% |
| GBP | 1.086,94 | 0,2% |
| NOK | 94,22 | 0,9% |

**Íløgufeløg**

| | Kursur | +/- % |
|---|---|---|
| Lánsbrøv í DKK | 105,09 | 0,0% |
| Evru Lánsbrøv | 174,00 | 0,2% |
| Norrøn Partabrøv | 109,15 | 0,2% |
| Altjóða Vøkstur | 74,36 | 0,3% |

*Broytingar eru útroknaðar í mun til fyri viku síðan. Myndirnar vísa gongdina seinastu 3 mánaðirnar.*